# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 18-11-2021

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons**
(Útseta gildiskomuna fyri treytini um mark fyri lønarinntøku)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, sum broytt við kunngerð nr. 217 frá 22. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis: "Við heimild í § 19, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, verður ásett:".

**2.** Í § 1 verður "§ 74, stk. 1, nr. 6 í løgtingslógini" broytt til: "§ 18, stk. 1, nr. 5."

**3.** § 5, stk. 3 verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* § 2 kemur í gildi 1. januar 2022, tó undantikið stk. 1, nr. 2 og stk. 2-5, sum koma í gildi 1. januar 2023."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, xx. desember 2021

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert